# Almennur føroyskur føstulávintsdansur í Havnar Klubba



Fríggjakvøldið 20. januar verður almennur føroyskur føstulávintsdansur í Havnar Klubba. Gomul siðvenja var at dansa føstulávints mánakvøld, men av tí at vanligur arbeiðsdagur er dagin eftir, gjørdist fríggjakvøldið undan føstuni alt meiri veitslukvøldið, tá fyritøkur og einstaklingar sláa tunnu, og mong kát og dansihugaði fólk eru í býnum hetta kvøldið. Henda broyting gjørdi, at Dansifelag Kaggans fyri mongum árum síðani tók stig til at flyta almenna føstulávintsdansin frá føstulávints mánakvøldi til føstulávints fríggjakvøld. Í øll árini hevur verið dansað í Kagganum, men sum kunnugt tæna hølir Kaggans í dag øðrum endamáli, og tí ber ikki til at dansa har nú. Dansifelag Kaggans stóð tí uttan hølir til almennan dans, men í góðum samstarvi við Havnar Klubba kundi Dansifelag Kaggans í fjør fyrireika almenna føroyska føstulávintsdansin í Klubbanum. Hetta eydnaðist sera væl, og tí verður tiltakið aftur í ár. Á midnátt verður ábit at fáa – heimabakað breyð við góðum viðskera. Dansað verður frá kl. 22 til 03.

# Lætt at søkja TAKS um MVG

**Síðan stevningarnar byrjaðu at rúka aftur og fram millum TAKS, bilasølur og bilkeyparar, stendur Palleba enn og ivast, hvussu hann skal gera, vil hann hava ov nógv goldna MVG'ið aftur**

MVG-MÁLIÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Sambært sølumanni er tað ein sera einføld mannagongd at søkja um at fáa goldið MVG'ið av skrásetingargjaldinum aftur. Tað er tó treytað av útfallinum á rættarmálunum, um tað verður goldið aftur ella ikki*

Hvussu er tað nú eg skal gera? Verði eg noyddur at stevna, skal eg hava meirvirðisgjaldið av skrásetingargjaldinum aftur? Ífall, hvønn skal eg so stevna? Loysir tað seg so at stevna?

Ofta hevur hann, ið keypti sær nýggjan bil í tíðarskeiðinum millum 1999 og 2005, sett sær hesar spurningar í seinastuni. Í miðlunum hevur verið nevnt, at einstakir bilkeyparar hava stevnt TAKS, aðrir hava stevnt bilasøluni, summir báðum, meðan onkur bilasølua eisini hevur stevnt TAKS. Men lítið og einki hevur verið frammi um, hvussu tann vanligi borgarin skal fyrihalda seg til hetta. Vit hava tí ringt til bilasølu og spurt, hvussu tú kann gera.

## Lætt nokk

Vit hava ringt til VR Bilar og spurt, hvussu mannagongdin er, vil tú hava hesar pengarnar, sum tú hevur goldið ov nógv, aftur.

- Hatta er lætt nokk. Tú kann venda tær til bilasøluna, har tú keypti bilin, og biðja um ein faktura upp á bilin, hevur tú mist tann upprunaliga vekk. Har standa allar upplýsingar á, ið tær tørvar. Síðan skrivar tú bert eitt bræv til TAKS har tú skrivar okkurt líknandi við at »Undirritaði søkir hervið, sambært hjálagda faktura, um endurgjald av ov nógv goldnum MVG av skrásetingargjaldinum«. Síðan setur tú tína undirskrift á, og sendir til TAKS, sigur Jóhan Petur Olsen, søluleiðari hjá VR Bilum.

Stutt eftir at bilkeyparin hevur sent brævið til TAKS, har hann biður um at fáa ov nógv goldna MVG'ið av skrásetingargjaldinum afturgoldið, fær hann eitt bræv aftur frá TAKS, har tey siga sína meining.

Her skal tó viðmerkjast, at tað er treytað av útfallinum á rættarmálunum, sum í løtuni koyra, um MVG'ið verður goldið aftur ella ikki.

## Ringja dagliga

Í seinastuni hava alsamt fleiri ringt til bilasølurnar at biða um hjálp.

- Í seinastuni hevur tað verið dagliga, at fólk ringja og spyrja um hvussu tey skulu fyrihalda seg. Síðan tað var uppi og vendi í fjølmiðlunum hava vit merkt, at tað eru nógv sum ikki heilt vita hvat og hvussu, greiðir Jóhan Petur Olsen frá.

Sambært sølumanninum er hetta ein mannagongd, ið er mestsum komin av sær sjálvum.

- Hetta eru ikki nakað, ið er fastlagt at tað skal fara fram soleiðs, men hetta er nokk fyri sikkurheits skyld, fyri at verja seg móti fyrning og so framvegis, sigur Jóhan Petur Olsen.

# Fakfeløg mótmæla sparingum

**Í yvirlýsing mótmælir Føroya Pedagogfelag sparingunum á almannaøkinum. Forkvinnan í fyri Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar stuðlar mótmælinum**

ALMANNAØKIÐ
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Føroya Pedagogfelag mótmælir í yvirlýsing avgerðini hjá Løgtinginum um sparingar á almannaøkinum, ið raka ov nógvar borgarar í landinum. Ikki einans verður víst á sparingar á Barnaheiminum og Pætursgøtu, ið hava verið umrøddar seinastu dagarnar, men eisini eldraøkið, heilsu- og sjúkrahúsverkið, Fróðskaparsetrið og fólkaskúlaøkið.

Forkvinnan í Felagið Føroyskir Sjúkraøktarfrøðingar, Vár í Gong, tekur undir við mótmælinum, og heitir á sínar limir, sum eru umfataðir av sparingunum, um at venda sær til felagið.

"Tað hevur stóran týdning at Nærverki er ein vælvirkandi stovnur, tí hesin er so týðandi fyri eitt stórt kjarnuøkið í samfelagnum. Vit vilja samstundis eftirlýsa eina visjónsætlan, sum mennir og styrkir starvsfólk í Nærverkinum", verður sagt í skrivi frá Felagið Føroyskir Sjúkraøktarfrøðingar.

# Landsstýriskvinnan arbeiðsfrið

**Javni og tey avvarðandi at búfólkunum í Pætursgøtu, hava lova landsstýriskvinnuni arbeiðsfrið fram til týsdagin**

ALMANNAØKIÐ
*Eilen Anthoniusssen*
*eilen@sosialurin.fo*

Fundur var í gjár millum landsstýriskvinnuna í almannamálum, Rósu Samuelsen, Javna og tey avvarðandi av búfólkunum í Pætursgøtu 3, um sparingar, ið tvinga niðurlegging av sambýlinum í Pætursgøtu. Javni og tey avvarðandi hava lovað landsstýriskvinnuni arbeiðsfrið til týsdagin, tá meir verður at frætta um málið.

"Tey avvarðandi og Javni fingu høvi at lýsa støðuna úr teirra sjónarhorni. Dentur var m.a. lagdur á, at tann umrøddi bólkurin er sera viðbrekin fyri broytingum, og at øll sambýli eru heim teirra, sum búgva har - og ongin eigur við kravboðum at kunna taka heimið frá fólki og flyta tey aðrastaðni. Tað hoyrir ikki heima í okkara tíð - í okkara parti av heiminum", og "Ongin ivi skal vera um, at Javni staðiliga mótmælir teimum spariætlanum, sum eru á brekøkinum", stendur at lesa á heimasíðuni hjá Javna.